FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208

Tórshavn, tann: 27. januar 2026
J.nr.: 22/13718-90
Viðgjørt: TM, BAB

Stílað: Fíggjarnevndini

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 034/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Greiðari ásetingar um, nær útgjøld byrja og inngjøld steðga, heimildin fyri frítøku í sambandi við tíðaravmarkað starv verður strikað, umframt tekniskar broytingar og fylgibroytingar av broyttari lóggáva á almannaøkinum)

Fíggjarmálaráðið mælir til, at bíðað verður við at seta í gildi broyting nr. 13 í lógaruppskotinum, og at hendan broytingin verður strikað úr broytingaruppskotinum.

Broyting nr. 13 snýr seg um, at útgjald skulu byrja mánaðin eftir, at eftirlønarsamanspararar røkka fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir o.a., tó við undantøkunum í stk. 5 og 9. Sbrt. verandi orðing av § 9, stk. 1, er ásett, at útgjald av eftirløn kann í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamansparari røkkur fólkapensjónsaldur sbrt. lóg um almannapensjónir o.a., og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón. Hetta hevur, sum víst er á í lógaruppskotinum, ávísar óhepnar avleiðingar og avbjóðingar við sær.

Fíggjarmálaráðið mælir til, at kannað verður nærri, hvussu nógvan skund tað hevur at seta hesa broytingina í verk. Fíggjarmálaráðið roknar við, at neyðugt verður innanfyri nøkur ár at endurmeta aðrar ásetingar í eftirlønarlógini, sum snúgva seg um útgjøld og inngjøld. Fíggjarmálaráðið mælir tí til, at bíðað verður við at seta broyting nr. 13 í lógaruppskotinum í verk til greitt er, hvørjar aðrar broytingar neyðugt verður at seta í verk hesum viðvíkjandi.

Eg fari tí at mæla Fíggjarnevndini til at strika broyting nr. 13 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn.

Tórshavn, 27. november 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum